# Útlitið fyri áhaldandi vøkstri í fólkatali Føroya

*Rolf Guttesen*

Tað er ætlanin í hesi grein at royna at viðgera tey mest grundleggjandi íbúgvarafrøðiligu hugtøkini, og vísa hvussu gongdin hevur verið í burðatali (tal av føddum fyri hvørjar 1.000 íbúgvarar) og deyðatali (tal av deyðum fyri hvørjar 1.000 íbúgvarar), sum samanhildin geva tann náttúrliga vøkstin, og meta um gongdina í næstu framtíð Føroyum viðvíkjandi. Um hesin nevndi náttúrligi vøksturin og tann veruligi vøksturin, sum fólkateljingarnar geva okkum tøl fyri, verða hildin saman, gevur tað okkum upplýsing um ein positivan ella negativan mun, sum kemur í orsakað av einari nettotilflyting ella -fráflyting.

Sjálvt uttan at kanna hagtøl, er tað flest øllum kunnugt, at ein fólkaflyting fer fram, bæði innanoyggja og til útlandið, og at henda flyting hevur fylgjur fyri alburs- og kynssamansetingina í kommunum landsins.

Vanliga eru tey diagrammini, sum avmynda burðar- og deyðatalið gjøgnum fleiri ár, skipað á tann hátt, at x-ásin er tíðarás, og y-ásin vísir støddina, oftast í procentum ella promillum. Hetta myndaslagið hevur tann vansa, at tann triðja støddin, náttúrligi vøksturin, ikki kann avlesast beinleiðis, uttan so at ein serlig farstrika verður teknað fyri hesa stødd, og so eru tríggjar ójavnt gangandi strikur at halda greiðu á í myndini. Tí havi eg valt at nýta tann avmyndingarháttin, sum er framaldur av *K. Witthauer* og brúktur í bók hansara »Verteilung und Dynamik der Erdbevölkerung«. 1. og 2. mynd eru av hesum slag. Upp eftir y-ásini verða

burðartølini avsett, og eftir x-ásini deyðatølini, frá høgru móti vinstru, tí at tey eru »negativ«, skilt á tann hátt, at deyðatalið minkar um fólkanøgdina í einum landi, meðan burðartalið økir um hana. Hava vit burðar- og deyðatal fyri eitt ávíst ár, kemur hetta punktið, sum er fastlagt av koordinatunum, einsamalt at umboða árið, bæði viðvíkjandi burðar- og deyðatali. Sama punktið gevur okkum eisini hitt triðja talið, náttúrliga vøkstin, tí B÷D=Vn, har B er burðartal, D er deyðatal og Vn er náttúrligur vøkstur. Skákstrikurnar, ið eru teknaðar, geva hesa støðd. Krossurin, sum er innteknaður til at miða seg eftir, gongur gjøgnum burðartal 25 ⁰/₀₀ og deyðatal 15 ⁰/₀₀, og armarnir umskarðast sostatt har náttúrligi vøksturin er 10 ⁰/₀₀. Hesin krossur býtir myndina upp í fýra teigar:

I: Teigurin ovast vinstrumegin hevur høgt burðartal og høgt deyðatal.

II: Teigurin ovast høgrumegin hevur somuleiðis høgt burðartal, men deyðatalið er lágt.

III: Teigurin niðast høgrumegin hevur bæði lágt burðartal og lágt deyðatal.

IV: Teigurin niðast vinstrumegin hevur lágt burðartal og høgt deyðatal.

Gongdin í flestøllum londum hevur verið úr teigi I um II og til teig III. Bert í heilt fáum førum verður teigur IV raktur. Næstan øll tey framkomnu londini í Europa og Norðuramerika, eins og Japan, liggja í dag í triðja teigi, meðan tilafturskomnu londin oftast liggja í fyrsta teigi ella í øðrum. Hetta almenna fyribrigdi, gongdin úr I um II til III nevnist á enskum »the demographic transistion«, hygg t. d. *W. Petersen* (1961), (11. bls.).

Men hvussu hevur gongdin so verið í Føroyum? Tey elstu tølini, ið higartil eru komin uppá prent hesum viðvíkjandi, eru at finna hjá *J. C. Svabo* í hansara »Indberetninger fra en rejse i Færøe, 1781—82«. Í kapitlinum »Om Folkemængden« setur hann hesa talvu upp:

1. talva

| | Communi-kanter | Ukonfir-merede | Ægte-skaber | Ægte Børn | Uægte | Døde |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | I sidste 10 Aar | | | |
| Suderøe .......... | 443 | 194 | 36 | 78 | 3 | 90 |
| Sandøe .......... | 328 | 60 | 28 | 61 | | 60 |
| Waagøe .......... | 301 | 83 | 21 | 64 | 3 | 74 |
| Syd-Strømøe ...... | 635 | 205* | | | | |
| Nord-Strømøe .... | 456 | 79 | 60 | 136 | 1 | 128 |
| Østerøe .......... | 770 | 270 | 62 | 212 | 8 | 205 |
| Norderøerne ...... | 405 | 180** | — | — | — | — |
| Summa .......... | 3338 | 1071 | | | | |

*) Da Præsten Winther ei kunde angive dem, som vare under 6 Aar, formedels Kirke-Bogens Urigtighed før hans Tid, har jeg for hvert af disse Aar antaget et tal af 15. Af samme Aarsag staae de øvrige Rubriker blanke.

**) Angivne Summer grunde sig paa en accurat Liste af 1769, med hvilken jeg formedelst Præstens Alderdom og Svaghed maatte mig nøje, tillige med hans oprigtige forsikring, at Folkemængden i dette præstegjæld, efter hans mening, var den samme, nu som da.

Alt fólkatalið verður eftir hesum 4.409, ella nakað minni enn í 1769, tá tann fyrsta royndin varð gjørd at hava eina fólkateljing; hon gav 4.773 fólk. Úr tveimum sýslum hevur Svabo ongar uppgerðir av føddum og deyðum. Men royna vit at rokna burðartal og deyðatal fyri tann partin av landinum, sum talvan gevur upplýsing um, so eru tilsamans í hesum 10 ára skeiði fødd 566 og deyð 557, og fólkatalið í teim upplýstu sýslunum er 2.984. Tað skuldi givið burðartal = 18,9 ‰ og deyðatal=18,7 ‰, sum avrundað verða bæði *19 ‰*. Talið kann bert takast sum ein meðalsýnislutur. Vit vita aðrastaðni frá, at serliga deyðatalið í eldri tíðum hevur flytst nógv upp og niður, men av tí at hetta er eitt 10 ára meðaltal, má tað kunna takast sum umboðandi fyri tíðarskeiðið umleið 1770 til 1780.

Tølini eru ógvuliga áhugaverd. Ikki bert tí tey vísa, at tann




1. mynd. *Samanberingardiagram. Vísir eina samanbering av burðar- og deyðatali í Føroyum og fýra øðrum londum um ár 1780. Tølini úr fimta landinum, Íslandi, eru frá 1876—85.*

Figure 1. *Comparative diagram. Showing a comparison of the crude birth rate (abscissa) and the crude death rate (ordinate) for Faroe Islands and four other coutries, England, Denmark, Sweden and Norway around 1780. The figures for the fifth country, Iceland, are from 1876—85.*

náttúrligi vøksturin í fólkatalinum hevur verið eingin, men heldur tí at tey eru so lág í mun til tøl úr øðrum londum. Í samanberingardiagramminum (Vergleichdiagramm), *1. mynd*, eru Føroyar og grannalondini Noreg, Svøríki, Danmark, England sett inn við tølum úr sama tíðarskeiði, og Ísland við tali frá 1876—85. Myndin vísir greitt serstøðu Føroya um hetta mundi. Hini londini hava øll eitt burðartal uppá 30 ‰ ella hægri, og samstundis eru deyðatølini frá umleið 26 ‰ til 30 ‰. Føroyar hava sum nevnt ein náttúrligan vøkst uppá 0 ‰, meðan hini londini liggja millum 4 ‰ (Noreg) og 8 ‰ (England). Hetta samsvarar væl við, at føroyska samfelagið, bóndasamfelagið, hevði ógviliga avmarkaðar møguleikar. Henda samfelagsskipan kundi ikki bera nakra stórvegis øking í fólkatalinum. Tí var burðartalið hildið niðri á ymsan hátt. Lógin setti frá gamlari tíð (Seyðabrævið) ávís krøv til mann, um hann skuldi sleppa at giftast og seta egið búgv. Meðalgiftingaraldurin hevur helst verið rættiliga høgur, sí *Holger Rasmussen* (1968).

Men hvussu kundi deyðatalið vera so lágt sum 19 ‰? Onnur lond sum Svøríki og Danmark koma niður á hetta tal eini 100 ár seinni. Tað bendir á, at meðallivitíðin hevur verið rættiliga long í Føroyum, ella sum Svabo tekur til »Man opnaar her en høj alder«. Tað átti at verið ein uppgáva hjá søguhugaðum læknum ella øðrum at kanna hetta sjaldsama fyribrigdi. Ein fólkateljing um leið 20 ár seinni (í 1801) bendir eisini á, at livitíðin hevur verið long, tí aldurssamansetingin vísir, at í prosentum hava aldri verið fleiri gomul fólk og samstundis færri ung, hygg mynd 3 hjá *R. Guttesen* (1970).

Á gongdardiagramminum, *2. mynd*, sum er bygt upp sum tey »Ablaufdiagramm«, sum nevndi Witthauer nýtir, er gongdin í burðar- og deyðatali saman við náttúrliga vøkstrinum avmyndað. Fýra tey elstu punktini eru avsett sum tíggju ára meðaltøl. 1880—85 er seks ára meðaltal, meðan restin, frá 1886—90 til 1961—65, eru fimm ára meðaltøl. Samanfatandi kann ein siga um hesa mynd, at hon vísir eitt hækkandi burðartal upp til 1911—15. Tá hava vit hægsta talið:




2. mynd. *Gongdardiagram, ið vísir gongdina frá 1770—1780 og fram til í dag í føroyska burðar- og deyðatalinum, og harvið eisini í tí náttúrliga vøkstrinum, sum verður avlisin á skákstrikunum. Prikkuta økið niðast til høgru í myndini, vísir tað ætlaðu leguna í næstu framtíð. 1970 er fyribilstal.*

Figure 2. *Flow diagram, showing the development from 1770—1780 to the present years in the crude birth rate (abscissa) and the crude death rate (ordinate) for the Faroe Islands. The natural increase can be read on the oblique lines. The dotted area in the lower right part of the figure shows the estimated position in the near future. The figure for 1970 is provisional.*

32,8 ‰. Síðan minkar tað skjótt, og kemur á botn longu í 1936—40, men tekur seg síðan uppaftur til eitt nýtt hávirði í fyrsta fimm ára skeiði aftaná heimsbardagan seinna. Við minkandi ferð fellur tað so aftur eini fimtan ár, men í 1969 og 1970 (hetta seinna er fyribilstal) tekur tað uppaftur ferð á seg og kavar niður á ávikavist 21,5 ‰ og 20,8 ‰. Orsøk til hesa nýggjastu lækking í burðartalinum er helst tann, at teir sonevndu p-pillarar fáa alt størri útbreiðslu, men orsøkin kann eisini vera tann, at hjúnarbandstalið er lægri enn árini frammanundan. Men enn eru eingi hagtøl fáanlig hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi deyðatalinum er eisini farin ein líðandi broyting fram. Sum heild hevur tað verið lækkandi alt hetta tíðarskeiði. Bert tvær ferðir hevur tað verið hækkandi við meira enn einum promille. Tað er millum 1840—49 og 1850—59, og so aftur millum 1891—95 og 1896—00. Uttan at viðgera tað nágreiniligari, skal her minnast á, at deyðatalið (deyð uppá 1.000 íbúgvarar) kann broytast, uttan at nøkur broyting hendir t. d. í meðallivialdrinum ella aldurstreytaða deyðatalinum. Orsøkin er tá tann, at aldurssamansetingin í fólkanøgdini broytist, tí at burðartalið hækkar ella lækkar, ella at ein flyting ger seg galdandi. Og burðartalið er júst hækkandi millum 1850—59 og 1911—15, soleiðis at tann samlaða fólkanøgdin sum heild verður yngri, og tí eru lutfalsliga færri í teim aldursbólkum, sum hava týðandi deyðafráfall.

Tað øvugta hendir nú í hesum árum. Tey nógvu, sum vórðu fødd fyrst í hesi øld (hygg 2. mynd), eru nú um 60 ár og koma sostatt inn í teir aldursbólkar, har deyðafráfallið er stórt. Aldursbólkurin yvir 60 ár veksur lutfalsliga, og tí má deyðatalið, sum er eitt lutfallstal eisini fara at vaksa. Tað hevur síðan 1951—55 ligið og flutt seg aftur og fram millum 7,5 og 6,8 ‰, og man innan fyri komandi 10 árini fara at røkka uppá ella upp um 8 ‰.

Hvussu kunnu vit hinvegin vænta, at burðartalið fer at ganga í komandi tíðum? Tað hevur týðuliga lyndi til at falla, men ringt er at spáa um framtíðina. Í »Investeringsbehovet for Færøerne 1969—1975«, København 1969, eru gjørdar 11

③




3. mynd. *Aldurssamansetingin í nettoburturflytingarstreyminum til Danmarkar, sum er nógv tann størsti einstaki streymurin úr Føroyum (80—85 %). Kvinnur høgrumegin, menn vinstrumegin. Aldursbólkar avsettir uppeftir.*

Figure 3. *The Age-structure of the net-migration stream to Denmark. This stream takes 80—85 % of the total net-migration from the Faroes. Women to the right. Men to the left. Age-groups on the ordinate.*

fólkatalsframskrivingar, allar við ymiskum fortreytum. Roknað verður við fýra møguleikum burðatalinum viðvíkjandi: a) at tað í árunum 1966—75 fellur til 18,4 ‰ (ella sum talið fyri Danmark í 1966), b) at tað í sama tíðarskeiði fellur til 13 ‰ (ella helvtin av tí føroyska burðartalinum í 1966), c) at tað framvegis fer at vera sum í 1966, nevniliga 26 ‰, d) at tað í tíðarskeiðinum 1966—75 fellur til 20 ‰. Møguleikarnir b) og c) vera hildnir at vera lítið hugsandi, meðan

a) og d) vera hildnir at vera rímiligir. Á *2. mynd* vísa tølini fyri tey tvey seinastu árini, sum fyrr nevnt, eitt týðuligt fall. Hetta fallið hevur eisini verið í grannalondum okkara. Í Íslandi minkaði burðartalið við 1/6, frá 1964 til 1968 ella frá 25,3 niður í 20,9 ‰. Í Danmark minkaði tað frá 1965 til 1969 somuleiðis við umleið 1/6, úr 18,0 til 14,5, men tykist nú at vera steðgað á. Í Noreg sæst einki týðandi fall at hava verið, og í Svøríki var burðartalið frammanundan heilt lágt, men tað hevur somuleiðis verið fallandi tey seinnu árini, í 1966: 15,8 ‰ og í 1969: 13,5 ‰. Um nú burðartalið í Føroyum eisini fer at minka við um leið 1/6, kunnu vit tí vænta okkum at talið fer úr 23 ‰ (meðal fyri 1961—65) niður á 19 ‰ um heilt fá ár.

Tann her nýtta støddin, burðartalið, verður sum nevnt roknað í mun til samlaða fólkatalið. Aðrastaðni er víst, *R. Guttesen* (1969 & 1970), hvussu kynslutfallið, roknað sum tal av monnum fyri hvørjar 100 kvinnur, hevur skift. Fyrr, t. e. áðrenn 1925, var meiriluti av kvennkyni í føroyska samfelagnum, men síðan hava menninir verið í meiriluta. Munurin gerst framvegis størri og størri, og í 1966 var kynslutfallið 110. Og sum her skal verða umrøtt gjølligari tekur burturflytingin mest av kvinnum úr aldursbólkinum 15—20 ár. Tað er eyðsæð, at eisini hetta fer at fáa negativa ávirkan á burðatalið.

*3. mynd,* sum vísir aldurssamansetingina av nettoflytingini til Danmarkar, er bygd á tilfar úr Statistisk Årbog yvir fleiri ár, tí enn eru ongar uppgerðir yvir alla nettoflytingina millum Føroyar og útlandið. Tað mest áhugaverda her er helst, at tað eru kvinnur millum 15 og 20 ár, sum eiga helvtina, 50 %, av allari nettoflytingini hendavegin; sami aldursbólkur av monnum letur 19 %. Bert í mannfólkabólkinum 25—29 ár er javnvág í frá- og tilflyting.

Í londum, har burðartalið enn er høgt, er vanligt, at tað eru kvinnur í aldursbólkinum 25—29 ella 30—34 ár, ið eiga lutfallsliga flest børn, meðan tað í londum, sum eru komin niður á eitt lægri burðartal, er vanligt, at kvinnualdursbólkurin 20—24 ár liggur á odda hesum viðvíkjandi.




4. mynd. *Gongdardiagram, ið vísir hvussu nógv ella lítið, ið nettoflytingin hevur tikið burtur av náttúrliga vøkstrinum í tíðarskeiðinum 1840—49 til 1966—70, hetta seinasta er tó fyribilstal. Prikkuti »kílin« í niðaru helvt av myndini gevur ætlaðu leguna fyri nettoflyting, náttúrligan og veruligan vøkstur í næstu framtíð.*

Figure 4. *Flow diagram. Abscissa shows the net-migration, which can be positive or negative, and ordinate shows the natural increase. The result, the actual increase in population, can be read on the oblique lines. The period is 1840—49 to 1966—70, this last figure is provisional. The dotted wedgeshaped area in the lower part of the figure shows the estimated future position for net-migration, natural and actual increase in population.*

Um aldarskiftið var tað so í Føroyum, at aldurstreytaða burðartalið var hægst í bólkinum 30—34 ár, og næst hesum komu bólkarnir 25—29 og 35—39 ár. Kvinnur í hesum aldri vóru tá kjarnan í tí barnføra partinum av fólkinum. (Stat. Medd., 4.56.4).

2. talva

Aldurstreytaðu burðatølini 1951—55, 1956—60 og 1961—65

| | 15—19 ár | 20—24 ár | 25—29 ár | 30—34 ár | 35—39 ár | 40—44 ár | 45—49 ár |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1951—55 | 24,3 | 161,0 | 211,9 | 161,8 | 109,6 | 46,9 | 6,5 |
| 1956—60 | 40,0 | 200,2 | 219,9 | 165,0 | 103,8 | 37,1 | 3,0 |
| 1961—65 | 46,7 | 236,8 | 207,2 | 157,1 | 92,9 | 37,6 | 2,9 |

Nú er hetta fyribrigdi broytt. Sum 2. *talva* (úr Stat. Tab. 1970, 1) vísir, er tað nú bólkurin 20—24 ár, sum hevur hægsta aldurstreytaða burðartal, og tað er í skjótum vøkstri. Við undantak av teim 15—19 ára gomlu, sum enn hava eitt rættuliga lágt burðartal, er aldurstreytaða burðartalið minkandi ella stendur í stað í øllum hinum bólkunum. Tað er tí at vænta, at kvinnur úr bólkinum 20—24 ár fara at fáa enn størri týdning hesum viðvíkjandi.

Samanhildið við tað, sum frammanundan er sagt um møguligu gongdina í deyðatali, kunnu vit sostatt vænta okkum ein náttúrligan vøkst í fólkatalinum upp á umleið 10 ⁰/₀₀. Men nú er náttúrligur vøkstur ikki tað sama sum veruligur vøkstur, tí í flestu førum fer fólkaflyting antin at leggja aftrat ella draga frá, alt eftir sum nettoflytingin gongur til ella frá landi. Hesin luttøkutáttur er tikin við inn í sundurgreiningina á *4. mynd.* Nettoflyting er í hesari mynd avsett sum x-ás, nettoútflyting til vinstru og nettoinnflyting til høgru. Nullstøðan er merkt við einum gráum loddrættum belti. Sum y-ás er náttúrligur vøkstur avsettur. Munurin millum nettoflyting, sum í flestum førum er negativ, og náttúrligan vøkst nevnist veruligur ella sannur vøkstur og kann í hesum føri beinleiðis avlesast á skákstrikunum í diagramminum. Koordinatarnir til tey einstøku punktini eru ikki báðir kendir. Vit vita einki

beinleiðis um, hvussu flytingin hevur verið, fyrr enn hesi seinastu árini, 1956—65, *R. Guttesen* (1969 & 1970). Men óbeinleiðis kunnu vit rættiliga lætt rokna okkum fram til heildartalið, tí vit hava fólkateljingarnar, og talið av føddum og deyðum er uppgjørt. Hesar upplýsingar geva okkum veruliga vøkstin (t. e. mununin í fólkatali í tveimum fylgjandi fólkateljingum), og náttúrliga vøkstin (tal av føddum ÷ tal av deyðum) í sama tíðarskeiði. Munurin millum náttúrliga og veruliga vøkstin gevur so nettoflyting, sum bæði kann vera positiv og negativ.

Verður *4. mynd* kannað gjølla, sæst, at í tíðarskeiðinum upp til 1906—10, meðan burðaravlopið sum heild er vaksandi, er nettoflytingin bert lítil, liggur oftast millum 0 og 2 ‰, og einstøk tíðarskeið er ein heilt lítil nettotilflyting. Samstundis sum burðaravlopið kemur í hæddina í 1911—15, broytir útflytingin legu. Tá fara í meðal 4,6 ‰ árliga, og tey fylgjandi árini tekur flytingin sum oftast yvir 2 ‰. Hagtøl vísa, at flytingin til Danmarkar í tríatiárunum vindur upp á seg (Stat. Tab. 1965), nettoflytingin tann vegin tekur 1933—35 3,6 ‰ og í 1936—40 so nógv sum 7,1 ‰ árliga. Til at viga upp í móti hesum streymi til Danmarkar er tí neyðugt, at ein annar streymur hevur gingið til Føroya, tí flytingin til útlandið sum heild er minni, enn hesi sertølini vísa. Men hvaðani hesin streymur er komin, dugi eg ikki at siga. Tað skal viðmerkjast, at ein vissur skeivleiki kann koma inn í rokningina í hesum tíðarskeiði, tí eingin fólkateljing varð hildin í 1940, og tí er talið ætlað við lineerari interpolatión millum teljingarnar í 1935 og 1945.

Tað kann tykjast løgið, at myndin vísir eina rættiliga stóra burturflyting í tíðarskeiðinum 1941—45, tá næstan alt ferðasamband við útheimin var kvett. Men í somu løtu sum Heimsbardagin var av, í mei 1945, fóru nógv, sum høvdu verið forðað, burtur. Nakað av fólki man eisini vera farið saman við bretsku hermonnunum. Næsta fimmáraskeið, 1946—50 gevur næstan javnvág í nettoflytingini. Úr Danmark er ein nettotilflyting upp á 17 fólk (Stat. Tab. 1965). Aðrar leiðir

hava tí havt eina størri burturflyting, tí úrslitið til samans hesi árini er, at flytingin tekur næstan 1 ⁰/₀₀. Tann fylgjandi tíðin, 1951—55, við einum vinnulívi í kreppu og stórum arbeiðsloysi, gevur tað størstu burturflytingina, sum føroyska samfelagið hevur upplivað. Árliga fóru næstan 13 ⁰/₀₀ ella meira enn 400 fólk, og nógv tey flestu fóru til Danmarkar (Stat. Tab. 1965). Síðani sýnist tað sum flytingin hevur lagt seg í rættiliga fasta legu, á um leið 4 ⁰/₀₀, við lyndi til at hækka hesi seinastu árini. Veruligi vøksturin hevur tískil ligið millum 14 og 12 ⁰/₀₀ og fer nú niður um hetta seinna talið.

Hvat ber so til at siga um næstu framtíðina út frá hesum fortreytum viðvíkjandi vøkstri í fólkatalinum? Brúka vit *4. mynd* sum grundarlag, og lata náttúrliga vøkstin lækka úr 17 ella 16 niður í 12 ella 10 ⁰/₀₀, og lata nettoflytingina vera av somu støðd sum í árunum 1961—65, so kemur veruligi vøksturin at liggja millum 6 og 8 ⁰/₀₀. Um flytingin enn einaferð tekur ferð á seg, sum fyrst í fimtiárunum, so minkar veruligi vøksturin niður um nullmarkið og verður negativur. Men sjálvt um føroyska samfelagið sleppur undan tílíkari stórrýming, so átti henda frágreiðing helst at givið varhugan av, at tann núverðandi samansetingin av flytingini og gongdin í burðar- og deyðatali fara at broyta fólkasamansetingina til tað verra og so líðandi at minka um vøkstin í fólkatalinum í Føroyum.

## SUMMARY

This paper discusses the demographic development on the Faroe Islands. Using the socalled comparative and flow diagrams developped by Kurt Witthauer, the crude birth rates and crude death rates are shown in *fig. 1* for the Faroes and some neighbour countries around 1780, making visible the very special situation for the Faroes in this period. Both the crude birth rate and the death rate are much lower than in the other countries. The flow diagram, *fig. 2,* with birth rate as ordinate and death rate as abscissa, shows the evolution in the rates for the period 1770—1780 to 1961—65, with the single years 1969 and 1970 to give an impression of the trend today when »the pill« is more commonly used. The natural increase in population can be read on the oblique lines. As shown on the

figure it is estimated that the fertility rate will fall with 1/6 from 23 ‰ to 19 or 18 ‰, and the death rate will increase slowly to about 8 ‰, due to the aging of the population. These trends together are estimated to give a natural increase of about 10 ‰, shown on the figure with a dotted area in the lower, right side of the diagram. On *fig. 4* the migrations are taken in consideration. Abscissa = net migrations which can be positive or negative. Ordinate = natural increase. Oblique lines = actual increase. The migrations are calculated indirectly, using the known figures for the total population in different years (the censuses) and the registrated numbers of births and deaths. Usually there is a net migration out from the Faroes. Only two periods in the 19 *th* century are showing net immigration. As the peak is reached in the crude birth rate, the net emigration is simultaneously increasing. Following the economic crisis in the first half of the 1950-*ies*, there is a very serious emigration, but later the figures stabilizes on about 4 ‰. With the supposed lowering in natural increase, the actual increase in the Faroese population is estimated to be only 8 % or maybe lower in the nearest future, (the dotted area). The composistion of the net migration of the net migration stream to Denmark (figures for the total net migration are not available, but 80—85 % of the faroese migrations are going to Denmark) are calculated as the mean for the period 1961—68, *fig. 3*. The figure makes the remarkable feature clear that 50 % of this stream is made up of women in the class 15—19 years, and there is a net emigration in all classes except for men in the class 25—29 years, which balances. This distorted composition of the net migration stream results in an ever increasing number of men per 100 women. In earlier periods there was a surplus of women. The proportion balanced in 1921 and 1925, but in 1966 there were 110 men per 100 women.

The outlook for the future growth of the faroese population is, according to these estimates for the near future, not very brigth. The main causes are the present lowering in the birth rate and the distortion of the composition of the population, caused by the serious surplus emigration of young women.

## BÓKMENTIR

Atlas över Sverige.

*Brækkehus, K.:* Befolkningsgeografi. Medd. fra Geogr. Inst. Kompendium. Oslo 1969.

*Clark, J. I.:* Population Geography. 1965.

*Guttesen, R.:* Færøernes interne og externe migrationer 1956—65. (margfaldað). 1969.

*Guttesen, R.:* Færøernes migrationer 1961—65, med kort befolkningsbeskrivelse. Geografisk Tidsskrift, bind 69, 1970.

Investeringsbehovet på Færøerne. Kbh. 1969.
*Matthiesen, P. Chr.:* Befolkningens vækst. Kbh. 1965.
*Matthiesen, P. Chr.:* Teoretisk Demografi. Kbh. 1970.
*Petersen, W.:* Population. 1961.
*Rasmussen, H.:* Føroysk Fólkamenning, Kbh. 1968.
*Svabo, J. C.:* Indberetninger fra en rejse i Færøe 1781—82. Kbh. 1957.
*Sømme, A.* ed.: Geography of Norden. 1961.
*Witthauer, K.:* Verteilung und Dynamik der Erdbevölkerung. Gotha Leipzig 1969.
Frá Det Statistiske Departement, København:

Statiske Meddelelser 1, 2, 2
» » 1, 3, 3
» » 3, 4, 4
» » 3, 12, 1
» » 4, 9, 1
» » 4, 56, 4
» » 4, 75, 4
» » 4, 94, 3
» » 4, 103, 4
» » 4, 128, 1 & 2
» » 4, 173, 3

Statistisk Tabelværk I, 6
» » II, I
» » 4, A, 5
» » 4, A, 7
» » 4, A, 9
» » 5, A, 2
» » 5, A, 15
» » 5, A, 16
» » 1965, Færøerne
» » 1970, 1

Statistisk Årbog, div. år